

# Fíggjarliga grundarlagið er sterkt

**Men bólkurin, sum fyrireikar ætlanina um undirsjóvartunlar á Skálafjørðinum, heldur ikki, at tað ber til at halda fram, fyrrenn politiski myndugleikin hevur givið sítt viðmæli**

SKÁLAFJARÐAR-TUNLARNIR
*Jóannes Hansen*

Fimm og eitt hálvt ár. Tað er tíðin, sum skal til, frá tí at loyvið er givið at fara undir ætlanina at gera tunnil tvørtur um Skálafjørðin og tunnil til Suðurstreymoy, og inntil tað fer at bera til at koyra í tunnlunum.

- Sjálv byggitíðin verður trý og eitt hálvt ár. Um tað varð farið undir fyrstu fyrireikingarnar í oktober í ár, so siga metingarnar hjá okkum, at tað hevði borið til at koyrt á sumri í 2011. Nú eru vit eitt sindur aftanfyri løgdu tíðarætlanina. Nær tað fer at verða koyrandi er ikki greitt enn. Tað valdast um, nær tað fer at bera til at fara víðari við fyrireikingunum. Felag skal stovnast, forprojekt skal gerast, samráðingar skulu vera við Vinnumálaráðið, tingið skal gera sítt, og ætlanin skal detailprojekterast. Men vit halda, at tað ber til at gera alt fyrireikingararbeiðið í tvey ár og so at arbeiða við tunnlunum í trý og eitt hálvt ár, sigur Niklas Foldbo, verkfrøðingur og limur í fyrireikingarbólkinum, og sum í sínum starvi hjá Landsverkfrøðinginum og hjá pf. Vágatunnlinum hevur nógvar royndir í tunnilsarbeiði.




*Ein 50-krónuseðil fyri at koyra av Toftum til Havnar. Tað er úrslitið, sum stitakararnir eru komnir til, tá tosað verður um prís fyri nýtslu av tunlunum*
Mynd: Vilmund

- Á Skálafjørðinum eru nógvar kanningar gjørdar. Í miðfláunum er gott at gera tunlar, men í einstøkum støðum verður neyðugt at leggja upp fyri rivum. Í Tangafirði verður neyðugt at gera fleiri kanningar, og har er dýpið upp til 80 metrar. Har verður komið í ovastu fláirnar, og royndirnar vísa, at tað kanska er torførari at borða í teimum. Men talan er ikki um trupulleikar, sum tað ikki kann vinnast á, sigur Martin Heinesen, limur í fyrireikingarbólkinum.

- Vit eru klárir at fara víðari við kanningararbeiðnum. Kostnaðurin av fyrireikingararbeiðnum, sum skal til, er mettur til seks milliónir krónur. Tí er neyðugt, at landsstýrið kemur við signalum um, hvat teir vilja og ætla, áðrenn vit kunnu fara víðari, sigur Ingi Høgjaard.

- Talan er um rættuliga sterkt fíggjarligt grundarlag. Vit rokna við ávísum ferðslulopi. Sambært ferðslusimuleringarnar, sum vit hava gjørt í samráð við ferðsluráðgevarafelagið Rambøl & Nyvig í Danmark, fer hetta at bera við sær, at bilatalið fyrsta árið verður 4850 um samdøgrið, og at tað eftir tjúgu árum fer at vera hækkað til 8341 bilar hvørt samdøgur. Prísurin fer fyri privatbilar at vera tíggju krónur fyri at koyra tvørtur um Skálafjørðin og umleið fjøruti krónur fyri størri bilar. Tað fer at kosta fjøruti krónur fyri privatbilar at koyra millum Eysturoy og Suðurstreymoy - tá fer tað einki at kosta at koyra tvørtur um fjørðin - og kostnaðurin fyri størri akfør ætlast at liggja um 190 krónur. Um eginpeningurin verður hundrað milliónir, um lánsupphæddin verður 700 milliónir, um roknað verður við 7 prosentum í rentu, og avdráttartíðin verður 25 ár, so verður úrslitið út frá okkara fyritreytum fyrsta árið 13,2 prosent í eginpeningsavkasti, upplýsir Tummas Eliasen, limur í fyrireikingarbólkinum.

Hann vísir harvið á, at ætlanin hongur saman, hóast ferðslutíttleikin ikki fer at økjast so nógv, sum tað verður roknað við, og hann vísir eisini á, at tað aðra staðni í Europa er vanligt at rokna við longri avdráttarskeiðum, enn tað verður roknað við í Føroyum.

- Vágatunnulin skal avdragast í fimtan ár. Tað er lutfalsliga ógvuliga stutt áramál. Í Noregi verður konsessiónin ella loyvi vanliga veitt 30 ár, og avdráttartíðin er sett til 25 ár. Longri suðuri í Europa er avdráttartíðin í sovonrum førum ofta hálvt hundrað ár, sigur Tummas Eliasen.

landsstýrismaðurin at biðja tingið um heimild til landsstýrismannin at geva felagi rættin at gera neyðugar kanningar av eitt nú botninum í Tangafirði við tí fyri eyga at finna fram til, hvussu tað skal farast fram, tá ið tunnil skal gerast.



*Nøkur av teimum, sum eru í fyrireikingarbólkinum, f.v.: Niclas Foldbo, verkfrøðingur, sum hevur staðið aftanfyri fleiri tunnilsbyggingar, Tummas Eliasen, stjóri á Føroya Lívstrygging og fíggjarkønur og Símun Johannesen, borgarstjóri í Nes kommunu*
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Hugsið um børnini og vatnið

**Kári Sverrison heitti á tey, sum arbeiða við tunnilsætlanum, eisini at hugsa um barnagarðsbørnini og um Toftavatn, sum hann heldur vera kanska størstu náttúruperluna í landinum**

SKÁLAFJARÐAR-TUNLARNIR
*Jóannes Hansen*

Fundurin á Svangaskarði mánakvøldið snúði seg um tunlar og um nógvar hundrað milliónir krónur. Fyrireikingarbólkurin legði eitt nú eftirgjørt filmsbrot fram, sum vísti, hvussu tunlarnir roknast við at fara at síggja út, og hvussu umhvørvið fer at síggja út, har tunnilsinntøkini fara at vera.

Í Breiðagili á Toftalandinum verður tunnilsmunnin ikki so langt frá Toftavatni, og vegurin, sum ætlast at fara eystur í rundkoyring, ið verður á núverandi Rituvíksvegnum, ætlast at liggja tvørtur um Løkin, sum rennur úr innara Toftavatninum og oman í Runavíkina. Fram við Rituvíksvegnum og nakað innanfyri ætlaðu rundkoyringina er stóri og rættuliga nýggi barnagarðurin hjá Runavíkar kommunu.

- Nú verður nógv tosað um tunlar, vegir, bilar og ferðslu. So vítt sum eg dugi at síggja, so fer tunnilin her at liggja rættuliga tætt at Toftavatni, og vegurin og harvið ferðslan fer at fara framvið bæði Løkinum og barnagarðinum á Mýrunum. Harvið verður vandi á ferð fyri Toftavatn, Løkin og børnini í barnagarðinum. Í staðin fyri at hava útsýni yvir Toftavatn, sum er størsta náttúruperla her á leið og kanska vakrasta og sermerktasta staðið í landinum, so fara tey at síggja yvir á vegir og tunlar og bilar. Tað líkar mær ikki væl at frætta.

Nakað soleiðis málbar Kári Sverrison, listarmaður, seg, tá ið hann sum tann fyrsti bað um orðið, tá ið tað var frítt á Svangaskarði mánakvøldið.

- Vit halda okkum hava hugsað um Toftavatn, Løkin og barnagarðin. Í málsviðgerðini er tað greitt, at friðingarmyndugleikin fer at skula siga sína meining um hetta. Men vit halda okkum hava lagt uppfyri tí, sum spyrjarin bar fram. Eitt nú ætlast møguleiki at vera fyri at ganga framvið Løkinum og undir vegnum, sum verður frá tunnilsmunnanum og eystur á Rituvíksvegin, svaraðu fyrireikararnir.